**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Kostráðgevi

Eitt fulltíðarstarv sum kostráðgevi (klinisk diætist) er leyst at søkja til setan 1. februar 2006, ella eftir avtalu.

Meginparturin av arbeiðsuppgávunum verða í neyvum samstarvi við toymið á diabetes amb. á G3. Tveir kostráðgevarar eru á Landssjúkrahúsinum, har tann eini er í diabetestoyminum.
Fyrisitingarliga hoyrir starvið til á Medicinska Deplinum.

**Arbeiðsuppgávurnar í høvuðsheitum**
- kunna, vegleiða og undirvísa sjúklingum og avvarðandi um mat og diabetes
- undirvísa einstaklingum og bólkum um diabetes
- saman við diabetestoyminum gera undirvísingarætlanir til sjúklingar
- kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um kostrøkt og kostviðgerð til diabetessjúklingar
- samskipa samstarv við aðrar deildir og primer øki viðvíkjandi diabetes
- sjálvstøðugar viðtalur
- harumframt verða aðrar kostráðgevara uppgávur í húsinum

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- innleiðslu
- møguleikar fyri fakligari menning

**Krøv til umsøkjaran**
- løggildug/ur kostráðgevi (autoriseraður kliniskur diætistur)
- faklig vitan innan økið
- góð samstarvsevni og kunna arbeiða tvørfakligt
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- vilja til at menna og taka nýggj arbeiðisøki upp
- KT-kunnleika á brúkarastøði

Fyrimun hava umsøkjarar sum hava drúgvar royndir innan øki

**Løn og setanartreytir** sambært sáttmálan millum Økonomafelag Føroya og Fíggjamálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Mariann Patursson, kostráðgeva, tlf. 304500, lokal 6205, mariannp@lsh.fo ella Evu Mortensen, deildarleiðara á G3, lokal 6250, evmo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 2. januar 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt "umsókn um starv" við CV, avrit av prógvum og viðmælum o.l., skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
att. Una Dalsgaard
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A



## Nýggj burturkastgjøld

Tórshavnar býráð hevur á býráðsfundi 24. november 2005 samtykt nýggj gjøld fyri vinnuburturkast, sum koma í gildi 1. januar 2006. Til ber at fáa nýggju gjaldskránna í Snarskivuni ella á Kommunalu Brennistøðini, og hon liggur eisini á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu www.torshavn.fo.



## Programmedarbeiðarastørv

Í Kringvarpi Føroya eru nøkur programmedarbeiðarastørv leys at søkja fyri medarbeiðarar, sum eru farnir úr starvi.

Starvslýsingarnar eru at síggja á heimasíðunum hjá kringvarpinum **svf.fo** og **uf.fo**

Umsóknirnar skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi týsdagin 27. desember 2005.

**Kringvarp Føroya**
Norðara Ringvegi · Postboks 1299 · 110 Tórshavn · Tel 34 75 00

*Jólafrí*

*Skrivstovan er stongd*
*frá 23. desember 2005*
*til 4. januar 2006*

**ARBEIÐSFELAGIÐ HÆDDIN**
Postboks 122 • FO-600 Saltangará • Føroyar • Tel. 447 924 • Fax 448 958

*Frá Arbeiðarafelagnum Hæddini*

*Limum okkara við familju*
*og samstarvsfólki okkara*
*verður ynskt eini gleðilig jól*
*og gott nýggjár við tøkk*
*fyri skjótt farna árið.*

***Nevndin***

**ARBEIÐSFELAGIÐ HÆDDIN**
Postboks 122 • FO-600 Saltangará • Føroyar • Tel. 447 924 • Fax 448 958

# Teknikapping í Sosialinum



Teknikappingin í Sosialinum er byrjað. Kapping er skipað soleiðis at hvønn dag til jóla, verður ein mynd av Jólamanninum Kjøtkróki í Sosialinum. Børnini skulu gera eina tekning, sum líkist so nógv sum gjørligt. Niðast á síðini er ein lepi, sum tit skulu klipsa saman við tekningini. Minnist til at tað skal verða ein lepi fyri hvørja tekning.

Tekninganir skulu verða okkum í hendi 27 desember. Tí tá kemur Kjøtkrókur oman í Miðlahúsið at finna vinnarin. Vinningurin er eitt gávukort á 1000 kr. frá einari av hesum fyritøkum:

**Hjá Gunleivi · Føroya Banki · Statoil BR-Leikur Føroya Lívstrygging · Føroya Bjór SMS · Tryggingarfelagið Føroyar · Kall Balslev · Føroya Tele · Skemman · MBM Daddan · FK · Rio Bravo · Nantong · Pizza 67 Farodane City · Vøruhúsið á Hjalla · Føroya Sparikassi · Atlantic Airways · Bowling Merlot · TelduTænastan · A.H.Jensen · Hjá Eli Smúkkuhjørnið · Postverk Føroya · Glas & List Atlanticpane**

Navn:____________________

Adressa:____________________

**Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "Teknikapping"**